## Eik fyllir 175 ár

Í morgin fríggjadagin fyllir elsti peningastovnur í landinum við nýggjasta navninum 175 ár. Talan er um Eik Banka, sum til desember í fjør kallaðist Føroya Sparikassi. Í sambandi við stóra føðingardagin bjóðar Eik til almenna móttøku frá kl. 14 til 16 á deildum bankans har viðskiftafólk, samstarvsfelagar, kappingarneytar og almenningurin annars eru hjartaliga vælkomin, skrivar Eik í tíðindaskrivi. Eisini í høvuðssætinum Yviri við Strond verður bjóðað til móttøku, har Marner Jacobsen, forstjóri, og Frithleif Olsen, nevndarformaður, fara at halda røðu.




## Óbroytt halgidagslóg

Tá Løgtingið samtykti at yvirtaka Fólkakirkjuna, mælti umsitinginum politikarunum til at orða eina føroyska halgidagslóg samstundis, so vit kundu fáa eina føroyska ístaðin fyri ta donsku. Men halgidagslógin kom kortini ikki. Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur við Útvarpið, at hvørki hann ella landsstýrismaðurin í mentamálum høvdu nakað ímóti at yvirtaka halgidagslógina, men at teir kortini samdust um at halda hana uttan fyri kirkjuyvirtøkuna.

# Fólkaflokkurin í part við andstøðuna um yvirtøkur

**Nú er vandi fyri uppreistri í samgonguni og at Fólkaflokkurin fer at kasta saman við andstøðuni fyri at yvirtaka fleiri málsøki, hóast hinir flokkarnir í samgonguni eru ímóti tí**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Vandi er fyri, at vit sleppa ikki at halda jól í hesi samgonguni, sigur Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins. Her situr hann í miðjuni, saman við øðrum fólkafloksmonnum á lagnusamgongufundi í morgun*

- Sleppur Edmund Joensen at gjøgnumføra ætlanina um at gera Føroyar til eitt valdømi, hevur hann brotið eina óskrivaða lóg í politikki. Men so er eisini vandi fyri, at aðrir tinglimir í samgonguni fara at gera uppreistur.

Jørgen Niclasen, nýggjur formaður í Fólkaflokkinum sigur, at tað verður byrjanin til endan hjá hesi samgonguni, at Edmundi Joensen fer í sjálvdrátt í spurninginum um at gera Føroyar til eitt valdømi.

- Við hesum hevur hann brotið eina óskrivaða lóg, sum sigur, at samgongan skal vera samd um tey mál, sum verða løgd fram og at tinglimir í samgonguni arbeiða ikki í sjálvdrátti, sigur Jørgen Niclasen.

- Tí er tað óloyalt ímóti samgonguni, at Edmund Joensen nú fer í sjálvdrátt.

Hann leggur afturat, at sleppur Edmund Joensen væl frá hesum, er lítil ivi um, at eisini aðrir tinglimir í samgonguni fara í sjálvdrátt og fara at leggja uppskot fyri Løgtingið, hóast samgongan ikki er samd um tað.

- Fyri at nevna eitt dømi, kundu vit í Fólkaflokkinum væl hugsað sær at fleiri mál vórðu yvirtikin, men semja er ikki um tað í samgonguni og tí hava vit bundið frið, sigur Jørgen Niclasen.

- Men sleppur Edmund Joensen í sjálvdrátt er lagt upp til politiskt lógloysi í samgonguni og so fara eisini aðrir tinglimir at leggja uppskot fram í sjálvdrátti, antin tað so hóvar samgonguni ella ikki.

### Fleiri yvirtøkur

Útlit eru fyri, at Fólkaflokkurin fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um at fremja fleiri yvirtøkur.

Jørgen Niclasen sigur, at skuldi tað verið, ivast hann ikki í, at bæði Tjóðveldisflokkurin, Miðflokkurin og kanska Sjálvstýrisflokkurin við, høvdu atkvøtt fyri fleiri yvirtøkum og tí kundi Fólkaflokkurin fingið fleiri mál ígjøgnum við hjálp frá andstøðuni, men uttanum restina av samgonguni.

- Tað er púra vist, at skuldi tað verið, hevði undirtøka verið fyri fleiri yvirtøkum, uttanum samgonguna og tað kann verða avleiðingin, sleppur Edmund Joensen framhaldandi at virka í sjálvdrátti.

Men skal hetta vera lagi, at samgongutinglimir fara í sjálvdrátt, verður heldur ongin møguleiki at gera eina fíggjarlóg.

- Verður uppskotið hjá Edmundi Joensen gjøgnumført, stúri eg sostatt fyri, at tað verður byrjanin til endan hjá samgonguni og so vænti eg ikki, at vit sleppa at halda jól í hesi samgonguni, sigur formaður Fólkafloksins.

Samstundis kann tað gera tað munandi torførari at skipa samgongu eftir eitt val, hóast tað verður ein nýggj byrjan.

Hinvegin sigur Jørgen Niclasen, at tað liggur ikki til hansara, at slíta eina samgongu og tað ætlar hann heldur ikki at gera í hesum føri. Hann vónar nevniliga framvegis, at tað eydnast samgonguni at tosa seg til eina semju í hesum máli, sum hon hevur gjørt í so nógvum øðrum málum frammanundan hesum.

Men hann skilir væl tinglimir, sum eru sinnaðir at slíta samgonguna upp á hetta málið, tí tað, sum er farið fram, er uttanfyri alt sømuligt mark.

Og skuldi tað hent seg, at uppskotið um eitt valdømi kemur til atkvøðugreiðslu, ivast formaður Fólkafloksins ikki í, at tinglimir í stóran mun fara at atkvøða soleiðis at teir hava frægast møguleikar at verða afturvaldir og ikki, eftir hvat teir halda tænir samfelagnum best.

Tá ið hesar reglur vórðu skrivaðar, var samgongufundur framvegis í Tinganesi um ætlanina at gera Føroyar til eitt valdømi. Greinarnar á hesum síðunum eru tí útfrá teirri fortreyt, at sam gongufundurin í dag endar úrslitaleysur.

# Fleiri fara at krevja sama rætt sum Edmund Joensen

**Fer Edmund Joensen í sjálvdrátt, fara fleiri tinglimir í samgonguni at krevja sama rætt og tá er vandi fyri, at samgongan skrædnar, heldur Jógvan við Keldu**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Edmund Joensen verur ikki einasti tingmaður í samgonguni, sum sleppur at taka sær rætt til at leggja uppskot fyri Løgtingið í sjálvdrátti.

Tað staðfestir samgongufelagi hansara, Jóvan við Keldu.

Hann sigur hóast hann ikki er sinnaður at slíta eina samgongu upp á eitt mál, sum hetta, sigur hann, at hetta kann saktans verða endin á samstarvinum ímillum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin.

- Eg vænti ikki, at samgongan slitnar akkurát upp á hetta málið, men hetta málið kann gera samstarvið so óliviligt, at hon slitkar kortini um eina tíð.

Fólkaflokstingmaðurin úr Klaksvík heldur ikki, at tað hevði hent nakra aðra staðni, at ein einstakur samgongutinglimur hevði lagt eitt uppskot fram í sjálvdrátti, uttan vælsignilsi frá samgonguni.

- Ein samgonga er ein avtala, sum einstakir tinglimir kunnu skúgva til viks, tá ið tað passar teimum.

Sostatt er løgtingsformaðurin í hesum føri farin út um alt mark, leggur Jógvan við Keldu afturat.

Og fara aðrir tinglimir at gera honum eftir, er ikki til at siga, hvat endin verður.

Eitt nú sær hann fyri sær, at tað hendir, at partar av samgonguni og andstøða finna saman um at samtykkja nakrar yvirtøkur, sum undirtøka annars ikki er fyri í samgonguni, heldur Jógvan við Keldu.

- Nú er tann ventilurin skrúvaður frá, leggur hann afturat.



*-Ventilurin í samgonguni er skrúvaður frá og tað kann fáa samgonguna at søkka, heldur Jógvan við Keldu. Her sita samgonulimir á avgerðandi samgongufundi í morgun*